# Restaði lítið í hjá føroyskum teldusnillingum

**Tað restaðu bara nøkur heilt fá stig í til, at føroysku teldusnillingar í Teamno1 kundu verða við, har tað er ordiliga stuttligt, tá ið teir luttóku í stórari teldukapping í Keypmannahavn um vikuskiftið. Teldumenninir sjálvir eru sera væl nøgdir, og hava fingið blóð upp á tonnina til at royna fleiri kappingar**

TELDUKAPPING
*Eyðhild Jacobsen*
*eydhild@sosialurin.fo*



*Ì næstum fer Teamno1, ið eru frá vinstru Rógvi Nielsen, Sunleiv Christiansen, Heini Weihe, Pætur Breckmann og Bjarni Jacobsen, til kapping í Bretlandi*

Sum okkara gløggi lesari nokk minnist, so skrivaðu vit í Vikuskiftissosialinum um fimm teldusnillingar úr Føroyum, ið høvdu stórar ætlanir til vikuskiftið. Teir skuldu nevniliga til stóra teldukapping í Bellasentrinum í Keypmannahavn at kappast móti tveytúsund luttakarum frá øllum heimshornum í telduspælinum Counterstrike. Vónina vóru tá rættiliga stórar, og nú tað er vorðin vanligur mánadagur aftur, kunnu teir ikki annað enn staðfesta, at hetta var upplivilsi vert.

– Hetta var sera stuttligt og ikki minst lærurík. Vit sóu, hvussu teir ordiliga professionellu spælararnir gera; tað var ordiliga stuttligt at síggja, hvussu væl teir dugdu at spæla saman. Vit hava avgørt fingið stóran íblástur til venjingina heima, sigur Heini Weihe, ið er ein av limunum í Teamno1.

## Líka við og næstan

Teamno1 kom í ein sera sterkan bólk. Millum annað var eitt sera sterkt lið úr Hollandi við, ið Teamno1 taptu ímóti. Eisini eitt sterkt lið úr Íslandi var við, og her megnaði føroyska liðið at spæla javnt. Tað var enntá líka við og næstan, at føroyska liðið kom víðari í sterka A bólkin.

- Men vit manglaðu bara nøkur heilt fá stig. Hetta kann sammetast við úr øðrum ítrótti, at vit høvdu málúrtøkuna ímóti okkum, sigur Heini.

Ìstaðin kom Teamno1 í veikara B bólkin, har teir dagin eftir vórðu slignir út úr kappingini. Hóast hetta, so vildu føroysku dreingirnir als ikki fara heim.

– Nei, vit máttu fáa finaluna við. Tað var sera spennandi, og eitt lið úr Brasilia streyk avstað við sigrinum. Eisini liðini, ið gjørdust nummar tvey og trý úr ávíkavist Póllandi og Danmark, vóru sera spennandi at hyggja eftir, sigur Heini.

## Fingið blóð upp á tonnina

Hetta er fyrstu ferð, at ungu harrarnir úr Føroyum royna seg í altjóða teldukapping, men hetta verður avgjørt ikki síðstu ferð. Ì næstum ætla teir sær til Onglands, har ein minni kapping verður.

– Kappingin í Bellasentrinum var kanska ein ov stórur gloypibiti hjá okkum. Har vóru sera sterkir spælarar, ið eru seru høgt uppi á styrkislistanum. Vit fara nú heldur at royna okkum móti eitt sindur veikari spælarum fyri at fáa okkum fleiri royndir, sigur Heini.

Heima venja teldusnillingarnir úr Teamno1 á internetinum serliga móti bretum, tí netsambandið er best til Bretlands. So Teamno1 vita nøkulunda, hvussu landið liggur her.

– Vit plaga at fylgja rættiliga væl við her. So tað verður spenndandi, tá ið vit fara at hittast á laninum í kappingini, sigur Heini Weihe, ið umframt Rógva Nielsen, Sunleiv Christiansen, Pætur Breckmann og Bjarna Jacobsen mannar teldubólkin, Teamno1.


PREKVALIFIKATIÓN

## Fiskivinnuskúlin í Vestmanna

Landsverk er byggiharri fyri almennar uppgávur, og henda verkætlan verður útboðin vegna Mentamálaráðið.

Útbjóðandi myndugleiki:
Landsverk
Tinghúsvegur 5
FO-110 Tórshavn
www.landsverk.fo
lv@lv.fo

Mannagongd fyri útbjóðing
Innboðin lisitatión í høvuðsentreprisu í prekvalifikatión. Ætlandi verður heitt á 4-6 tilboðsgevarar at bjóða.

Lýsing av verkætlanini
Verkætlanin umfatar ein fiskivinnuskúla, ið skal byggjast á økinum við ferjuleguna í Vestmanna við plássi fyri 100 næmingum, tilsamans umleið 1300 m². Boðið verður út í høvuðsentreprisu.

Umbøn um luttøku
Umbønin skal sendast til Landsverk ella umvegis teldupost til lv@lv.fo

Áheitanin skal verða okkum í hendi í seinasta lagi hósdagin 1. mars, 2007.

Áheitan um luttøku
Áheitanir um at geva tilboð verða sendar út saman við útbjóðingartilfarinum um miðjan mars 2007.

Samtøk og felagsskapir
Allir luttakarar í einum samtaki ella líknandi felagsskapi skulu geva skrivliga váttan fyri felags hefting og ábyrgding fyri sáttmálanum. Felagsskapir og samtøk skulu harafturat frammanundan tilnevna ein umboðsmann við skjalprógvaðari fulltrú til, vegna felagsskapin ella samtakið, at tekna bindandi avtalur við byggiharran.

Upplýsingar at nýta til prekvalifikatiónina
Umsøkjarar skulu saman við eini umbøn um luttøku senda hesar upplýsingar:

- Upplýsingar um arbeiðstakarans egnu viðurskiftir og tær neyðugu upplýsingarnar og formleikarnar til meting av tí kravdu minstuorku av búskaparligum, fíggjarligum og tekniskum slagi.
- Upplýsingar um bygnaðin hjá fyritøkuni, herundir møguligt samband við móðurfelag.
- Stutt lýsing av, hvussu uppgávan verður loyst. Dentur verður lagdur á leiðslu og stýring, logistikk, byggitíð, trygging av tilfarsveitingum og góðskutrygging.
- Váttan ella trúnaðarváttan um, í hvønn mun arbeiðstakarin hevur ógoldnað skuld til tað almenna, ið er fallin til gjaldingar.
- Avrit av viðkomandi vinnulívstrygging, upplýsing um eginpening og javna í roknskapi, tá ið søkt verður, saman við váttan av samlaða umsetninginum í meðal seinastu trý árini.
- Upplýsing um árliga meðaltalið av fólkum í starvi hjá fyritøkuni.
- Ummæli frá samsvarandi uppgávum.
- Lívsgongdarlýsing (CV) hjá lyklafólkum, ið verða sett á hesa uppgávu.
- Upplýsingar um góðsku-, trygdar- og heilsuskipanir, umframt umhvørvisstýrisskipanir hjá fyritøkuni.

*Landsverk er ein stovnur undir Vinnumálaráðnum, og hevur um hendi vega-, byggi- og havnamyndugleikauppgávur og flogvallamál.*

*Stovnurin ráðleggur og ger ætlanir, útinnir, rekur og viðlíkaheldur landsvegir, havnir, bygningar og tyrlupallar.*

LANDSVERK
byggir land

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn, | Tel 340 800, Faks 340 801, lv@lv.fo, www.landsverk.fo